# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
POST@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*»– Sambandsflokkurin er tann flokkur í Føroyum, ið uttan nakað kjak hevur havt størstu positivu ávirkan í føroyskum politikki seinastu 100 árini. So einfalt er tað!«*

MARJUS DAM, LØGTINGSMAÐUR

## Álitið á landssjúkrahúsið

Tær ákærur, sum Bill Justinussen, løgtingsmaður setir fram imóti landssjúkrahúsinum, eru heilt óvanliga grovar og sera álvarsamar. Tingmaðurin vil vera við, at dømi eru um, at sjúklingar, sum kommunulækni sendir á Landssjúkrahúsið í bráðskundi við sjúkrabili, verða sendir heim aftur uttan viðgerð. Hetta er ein av fleiri álvarsligum skuldsetingum, sum verða settar fram ímóti læknunum á Landssjúkrahúsinum. Tá ið Løgtingið kemur saman aftur í næsta mánaða, fer løgtingsmaðurin at spyrja landsstýrismannin í heilsumálum nakrar sera hvassar spurningar um tænastustøðið á okkara høvuðssjúkrahúsi.

Í hesum samabandi vil Bill Justinussen vera við, at sjúklingaviðgerðin á Landssjúkrahúsinum er merkt av líkasælu, tilvild og vantandi lænaligum dugnasemi. Bill fer at spyrja, um landsstýrismaðurin veit, at nógvir sjúklingar ikki hava álit á, at Landssjúkrahúsið er ført fyri at veita neyðugu viðgerðina, og tí heldur vilja fáa viðgerð aðrastaðni. Hann vil eisini hava at vita um Hans Pauli Strøm veit av, at deyðiliga sjúk, verða vend í hurðini á Landssjúkrahúsinum og send heimaftur, hóast tey eru ávíst hagar av kommunulækna og landsstýrismaðuirnveit av, at sjúklingar við álvarsligum sjúkum, verða sendir heimaftur uttan viðgerð av tí at samskifti ímillum læknar og aðrar starvsbólkar á Landssjúkrahúsinum er ov vánaligt?

Her er tala um helt óvanliga hvassar atfinningar at einum almenum stovni. Viðkomandi landsstýrismaður Hans Pauli Strøm er týðuliga illa við av teimum skakandi skuldsetingunum. Hann heldur, at kann løgtingsmaðurin ikki føra ítøkilig og óreingilig prógv fram fyri sínum ákærum ímóti Landssjúkrahúsinum, er tað rættiliga álvarsamt fyri hann. Landssjúkrahúsið er ein ógvuliga týðandi stovnur í okkara samfelag og tað er ein stovnur, sum fólk mugu og skulu hava fult álit á. Kann hann ikki prógva sínar skuldsetingar, er tað rættiliga álvarsamt fyri løgtingsmannin, tí hann oyðileggur trúvirðið hjá einum stovni, sum fólk mugu kunna hava álit á, og tað er álvarsamt fyri ein politikara. Men kann Bill Justinussen hinvegin prógva sínar skuldsetingar, er tað álvarsamt fyri landssjúkrahúsið, leggur Hans Pauli Strøm afturat. Hetta er eitt sera løgið mál, og landsstýrismaðurin, sum týðuliga tekur hetta mál í størsta álvara, má ger alt,sum gerast kann, til tess at fáa greiði á hvat hetta snýr seg um. Her stendur nógv uppá spæl: álitið á Landssjúkrahúsið, álitið á Løgtingið og álitið á landsstýrismannin.

**Sosialurin**

# Viðmerking til uppskot Jørgin Niclasens um at kanna arbeiði hjá Fiskirannsóknarstovuni

**ATLI GREGERSEN**



Jørgin Niclasen hevði herfyri eitt uppskot um at kanna arbeiði hjá Fiskirannsóknarstovuni.

Jørgin Niclasen hevur púra rætt, tá ið hann sigur, at skeivar ráðgevingar frá fiskifrøðingum kunna kosta samfelagnum 100 tals milliónir um árið. Tað er í tøkum tíma, at onkur setur tær økonomisku avleiðingarnar av førdum fiskivinnupolitikki í rætt perspektiv.

Tí er uppskot hansara um seta eina kanning í verk av Fiskirannsóknarstovuni heilt upp á sítt pláss.

Tað er ongin loyna, at landsins myndugleikar, hvørki Føroya Løgting ella skiftandi fiskimálaráðharrar, hava fylgt tilráðingunum frá Fiskirannsóknarstovuni í serliga stóran mun.

Líka so væl sum »skeiv ráðgeving«, um hon verður fylgd, kann kosta samfelagnum 100 tals milliónir árliga. Líka so væl kunna skeivar politiskar avgerðir, ið ikki fylgja kompetentari ráðgeving frá sakkunleikanum kosta samfelagnum 100 tals milliónir árliga.

Tí skjóti eg upp, at kanningin hjá Jørgini eisini skal umfata politisku skipanina. Um tað er so, at politikkararnir ferð eftir ferð hava tikið skeivar avgerðir ímóti fakligari ráðgeving, sum hava kostað samfelagnum og harvið okkum borgarum dýrt, so eigur hetta sjálvandi eisini at koma fram í ljósið.

Vísir kanningin, at Fiskirannsóknarstovan ikki veitir kompetenta ráðgeving, so eigur tað at fáa onkrar avleiðingar, tí sum Jørgin so rætt sigur, avleiðingarnar kosta samfelagnum sera nógv. Vísir kanningin hinvegin, at skiftandi fiskimálaráðharrar (m. a. Jørgin Niclassen) og meirilutin av tingmanningini hava ignorerað kompetenta ráðgeving og harvið hava søplað 100 tals milliónir vekk árliga er spurningurin greiður.

Hvørjar avleiðingar skal tað eventuelt fáa?

# Nær steðgar Bjarni Djurholm við sínum ágangi á føroyska mentan

**BILL JUSTINUSSEN**
løgtingsmaður fyri Miðflokkin



Nú vil hann aftur eitt stig víðari móti fullkomnu liberaliseringini av rúsdrekkasølu. Hesaferð snýr tað seg um at broyta rúsdrekkalógina soleiðis, at til ber at sita á gongubreytunum og sutla øl í seg. Ófatiligt, at hesin maður ikki dugir at skilja, at vit ikki eru stødd í Danmark ella í øðrum líknandi londum, har øll mørk fyri frælsi hins einstaka eru strikað – sjálvandi við teirri avleiðing, at frælsið hjá teimum veikaru, harímillum barnanna, er sett til viks. Alt summarið hava fólk sutlað so nógv rúsdrekka í seg sum ongantíð áður, og allíkavæl heldur landsstýrismaðurin, at tað helst er møguligt at fáa føroyingar at drekka enn meiri. Vælsignaður Bjarni Djurholm, nær heldur tú uppat við hesum áganginum. Tú mást vera greiður yvir, at tað eru mong túsund menniskju her á landi, sum ikki ynskja hatta samfelagið, sum tú arbeiðir fyri. Tað eru nógvir føroyingar, sum ynskja eitt samfelag í siðprýði, har børnini og tey ungu verða vird, vard og sett í hásæti og teirra rættindi til gott umhvørvi verða tikin fram um rættindini hjá teimum vaksnu, sum absolutt ikki kunnu eta ein bita uttan øl og vín afturvið.

Bjarni Djurholm segði fyrr í summar, at hevði hann vitað, at gjørdu broytingarnar í rúsdrekkalógini høvdu vakt so miklan ans, hevði hann helst ikki lagt uppskotið fram. Men nú arbeiðir hann longu við næstu broyting. Eg kann lova Bjarna Djurholm, at tað verða ikki minni harmaljóð at hoyra frá okkum í Miðflokkinum hesuferð.

Hóast vit enn bert eru 2 tinglimir av 32, so vilja vit ávara og rópa sum ongantíð áður, tí fyri okkum sær kósin hjá hesi samgongu út til at vera heilt greið: longur fram á leiðini móti fullkomiliga fríari rúsdrekkasølu. Hendan samgongan tykist alt meiri at vera ein skaðasamgonga fyri okkara annars góða samfelag, og tykist aðaltátturin at vera altjóðagerð, har tað snýr seg um at avnokta alt, sum er gott føroyskt fyri at innflyta fremmandar mentanir og tíðarrák. Takið tykkum saman og brúkið tíðina til okkurt skilabetri.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.
Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni. Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Lív Højsted Horsdal horsdal@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Heini Kristiansen heinik@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.